**Viðmerkingar til tónleikasíðurnar? Hugskot til tónleikatíðindi?**
Skriva til sunneva@sosialurin.fo

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*sunneva@sosialurin.fo*



elektroniskur tónleikur • Føroysk DJ mentan og elektroniskur tónleikur

hatta har, sum eingin tímir at hoyra nú. »Grease megamix«, »Summer of ’69« osfr. Eg visti ikki so nógv um tað at vera DJ tá, men eg spældi bara fyri at gleða fólk. Nú er tað blivið øðrvísi, tí at eingin tímir at standa og bara blíva við at trýsta á »play«. Nú er mann DJ fyri at framføra sínar egnu samansettu playlistar, miks, dygdir við effektum osfr.

- Motivatiónin liggur í at sleppa at undirhalda fólki við tínum tónleiki. Í at fáa tey at reagera og snakka við tey ígjøgnum tónleikin. Tað má vera ein útfordring. Tað er nevniliga ein rættiliga kompliseraður teknikkur, sum skal til, um tú skalt vera ein hampuligur DJ. Trupulleikin í Føroyum er bara, ella hevur í øllum førum verið inntil nú í seinastuni, at øll skíta á, hvør er DJ, og hvat fyri tónleikur verður spældur. Inntil víðari hevur tað næstan verið soleiðis, at teir vánaligastu donsku DJ’arnir hava verið betri enn nakar føroyskur.




*Stakfløgan »Booster« hjá Árna Neon er givin út ígjøgnum plátufelagið Nightrain Music í Florida. Útgávan kann einans keypast sum download og tað á 12 ymsum heimasíðum í fýra londum*

- Eg haldi tó, at hendan hugsanin er við at broytast. Tað blívur stuttligari at DJ’a fyri hvørja ferð. Fólk skilja betri, hvat gongur fyri seg og byrja at hoyra tað, tá mann ger okkurt serligt miks. Tey halda ikki longur, at tað bara er ein fløga, sum verður koyrd frá, men tey skilja arbeiðið í tí. Hetta ger tað nógv meira nøktandi.

- Tað er eisini blivið ein útfordring nú meira enn nakrantíð, serliga tí at fleiri DJ’ar eru komnir, og kapping er komin í. Støðið er spakuliga byrjað at blíva betri, og við tíðini skulu vit nokk koma har, sum restini av heiminum er. Føroyingar hava bara altíð verið so seinir í sovornum.

**Tónleikurin og komandi gigg**

Hoyr tónleikin hjá Árna Neon á myspace síðu hansara, myspace.com/djjoensen. Á hesari síðuni er eisini leinkja til beatport.com, har tú kanst keypa staklagið Booster.

Árni Neon er bookaður í Eclipse næstu mánaðirnar.

# … seg vera nakað



*- Jantelógin er ikki líka nógv galdandi nú, sum hon var, men hon er har enn. Ein sleppur enn ikki heilt at standa einsamallur aftanfyri pultin og vera kul*

ikki spæla alt tað, sum tú vilt, tí fólkið kemur ikki at lurta eftir tær, men vil altíð hava okkurt annað. Eitt ella annað stað haldi eg eisini, at tað er ein forðing hjá mær, at eg minnist teir gomlu dagarnar. Tað ger, at eg eri eitt sindur smæðin við at spæla alt tað, sum eg vil. Teir yngru DJ’arnir eru nógv meira upfront og gera bara tað, sum teir gera. Teir skíta so deiliga nógv á, hvussu lítið mentaðir áhoyrararnir eru.

*Hevur tú nakað boð uppá, hví hendan útviklingin fer fram júst nú?*

- Tað trúgvi eg er tí, at fólk tora betri at standa fram í dag. Fólk eru farin at dáma house, techno osfr. Høvdu promotorarnir á teimum ymsu klubbunum ikki verið so líkaglaðir við, hvat teir smekka á plakatina, hevði føroyska náttarlívið kunnað verið enn meira etablerað.

- Jantelógin er ikki líka nógv galdandi nú, sum hon var, men hon er har enn. Ein skal ongantíð halda, at ein er nakað; ein sleppur enn ikki heilt at standa einsamallur aftanfyri pultin og vera kul.

*Hevur tú nakað boð uppá, hvat vit kunnu gera betri?*

- Fyrst og fremst skuldu vit havt fleiri arrangørar/promotarar, ið ikki eru so líkasælir við góðskuni. Áðrenn ein bólkur ella DJ verður bókaður, áttu teir at kanna, at viðkomandi navn dugir nakað live og ikki bara bóka hann, tí hann kann trýsta á play og spæla í fýra tímar. Tað snýr seg ov nógv um pening hjá føroyskum bookarum. Húsið skal bara fyllast, og tað er tað.

- Og ikki minst hevur tað alstóran týdning, at DJ’arnir gera tað við hjartanum. Eitt slíkt starv skal drívast við gleði og áhuga. Tað er eisini tað feita, sum eg havi upplivað niðri í Cippo, tá Undirbeat er; at allir djarnir brenna fyri tí. Tað smittar fjøldina og gevur eitt nógv meira positivt huglag. Fólk kunnu dansa og hava tað stuttligt uttan at vera hamrandi skít ella uppá stoffir, og tað er mega kul.

- Tað tekur nokk bara eitt sindur av tíð afturat, inntil fólk hava lært at vera kul, tá tey fara út. At taka ímóti nýggjum tónleiki og umhvørvi. Tí dámar tær tað ikki, kanst tú bara fara onkra aðrastaðni. Fyrr høvdu vit bara Club20, men í dag er nógv meira at velja ímillum. Fólk skulu bara líka læra at hava eina positiva tilgongd til DJ mentanina. Og tá tað hendir, fer tað at vera nógv feitari at vera DJ í hesum landinum. Inntil ta tíð, má ein bara síggja tað sum eina avbjóðing og gera sítt besta.

Vitja Frisko á myspace.com á adressuni myspace.com/frisko28i



*– Eg eri so syndarliga trekur at dansa. Dugi heldur ikki. Tá mann gekk í býin, snúði tað seg meiri um at drekka seg sansaleysan. DJ’urin, plátuvendari, ella hvat tað æt, var av minni týdningi*

# Hugleiðingar um føroyska DJ mentan

*Petur Pólson*

Eitt tað allarbesta, eg havi upplivað í nýggjari tíð, er, at síggja mín góða vinmann, Knút Háberg Eysturstein, standa sælur á einum dansigólvi, við einum hálvfjákutum, hálvsælum andlitsbrái, inniliga dansandi.

Tað er nakað serstakliga rørandi við teirri sjón. Minnist, at eg og sami Eysturstein stóðu einaferð í Club 20 og filosoferaðu øgiligt um alt, sum gekk fyri seg har. Kjøtmarknaðin. Tónleikin. Smyrslið og alt, sum livir og rør seg har. Og tað er gott til tað, tað er. Tó at tað ikki altíð er so lætt at vita júst, hvat tað er. Tað er eitt slag at vera til uppá. Eitt slag at vera ein partur av sær sjálvum. Eitt slag av rásarúmi. Eitt slag av andarúmi. Tað segði sum so ongantíð mær nakað. Havi altíð kent meg sera, sera illa í sambandi við at dansa. Tað er eisini nakað, eg onkuntíð fái at vita frá konuni. Eg eri so syndarliga trekur at dansa. Dugi heldur ikki. Tá man gekk í býin, snúði tað seg meiri um at drekka seg sansaleysan. DJ’urin, plátuvendari, ella hvat tað æt, var av minni týdningi. Tað var partur av ambiensini. Av huglagnum. Tónleikurin var av minni týdningi. Seinastu dansirútmurnar, sum við vissu fingu fólkini, sum vóru so pyntað og smurd og lekkur, at rista kroppin eitt sindur, lyfta annan armin, men ikki longri enn so, at tú sást sveittablettirnar. Og tey ristu. Onkuntíð, nóg mikið varð komið niður um, fór mann sjálvur at blamera seg á gólvinum. Tá ein var so passaliga doyvdur, at ein onki legði í tað alíkavæl. Heldur ikki tað.

Fyri nøkrum vikum síðani var eg á Undirbeat tiltaki. Havi ikki gingið í býnum tað, sum kann kallast nakað. Legði av at doyva meg fyri seks árum síðani. Trongdin at sveiggja reyv, og síggja reyvar hjá øðrum sveiggja, minkaði onkursvegna. Býarlívið misti týdning (um tað nakrantíð hevði nakran). Men eg smakkaði nakað hetta kvøldið fyri nøkrum vikum (ella mánaðum) síðani. Eitt annað slag av »at ganga í býin«. Har tónleikurin hevði týdning. Har DJ’urin hevði týdning. Har frælsið at vera júst tann, tú ert, soleiðis sum tú ert tað, hevði týdning. Har ongin hugdi niðrandi eftir einum øðrum, tí at plaggini vóru giggut. Tí at tað var ok at vera giggutur. Ella kanska tað kendist bara soleiðis hjá mær, tí eg eri giggutur. Har tað ikki kendist sum ein meiningsleysur kjøtmarknaður, har tað fyrst og fremst snýr seg um at sleppa niður í fremmandar trussur at grópa. Har staðið sjálvt hevði týdning. Ikki tað, ið drukkið verður. Og spýð. Helst eisini frígjað. Sigi ikki tað. Men rúm var. Tað er tað eisini aðrastaðni. Bara ikki fyri øllum. Nú er pláss fyri fleiri. Har tað, at venda eini plátu, er ein list í sær sjálvum. Har tú gert títt egna DJshit. Har fólk sleppa at vera giggut, nørdut, kiksað, pen, ljót, grað, glað, samkynt, hinkynt, eittkynt, altkynt, alt í senn. Har eg kendi tað, sum var tað eitt stað, sum var jaligt. Har verðin og lívið dansaðu. Har Knút dansaði.